Bárður á Steig Nielsen
Helgi Abrahamsen
Magnus Rasmussen
Erhard Joensen
Johan Dahl
Eyðdis Hartmann Niclasen
løgtingsmenn

Løgtingið

Uppskot til samtyktar um at gera eina rehabiliterings- og endurvenjingarlóg fyri Føroyar

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um rehabilitering og endurvenjing í Føroyum, sum tryggjar borgarum rættindi og møguleikar fyri dygdargóða endurvenjing og í hesum sambandi at

- Greina tørvin á einum føroyskum endurvenjingarsentri, herundir staðseting, fígging og samstarv við heilsuverkið og kommunur og

- Kanna møguleikarnar fyri samstarvi við aðrar norðurlendskar stovnar innan rehabilitering fyri at tryggja, at føroyska skipanin er fakliga væl grundað

Viðmerkingar
Tað kann raka okkum øll, uttan undantak. Ein dag ganga vit og eru frísk, næsta dagin kann ein sjúka ella ein skaði venda øllum á høvdið. Tað kann vera ein heilabløðing, ein hjartasteðgur, ein bilvanlukka, ein arbeiðsskaði ella langvarandi sjúka. Tá byrjar stríðið fyri at koma aftur á føtur - bæði likamliga og sálarliga.

Í dag hava vit í Føroyum onga skipaða, samlaða skipan, sum tryggjar, at fólk fáa ta endurvenjing, tey hava tørv á. Summi fáa góð tilboð, onnur fáa lítið ella einki. Tað veldst um, hvar tú býrt, hvør læknin er og hvørjir tilvildarligir møguleikar eru til staðar.

Mong verða send til Danmarkar ella aðrastaðni, men har eru avbjóðingar:
- Tú mást vera burtur frá familjuni í vikur ella mánaðir
- Tað er torført at halda fram við viðgerðini, tá tú kemur heim
- Tað kostar landinum ómetaliga nógv

Hetta er ikki rættvíst. Og tað er ikki skilagott – hvørki fyri tey sjúku ella fyri samfelagið.

Tí mugu vit gera tvær stórar broytingar:
1. **Ein rehabiliteringslóg** – sum gevur øllum føroyingum rætt til góða endurvenjing, sama hvar í landinum teir búgva og sum tryggjar, at ábyrgdarbýtið millum sjúkrahús, kommunur og onnur er greitt.
2. **Eitt føroyskt endurvenjingarsentur** – har vit savna fakligu førleikarnar, so fólk sleppa at fáa alt tað, tey hava tørv á, heima í Føroyum, og kunnu hava familjuna hjá sær, meðan tey venja seg aftur til eitt vanligt lív.

Hví hetta hevur so stóran týdning:
- Tað gevur fólki møguleikan at fáa lívið aftur eftir sjúku ella skaða
- Tað minkar um sjúkudagar og ger, at fleiri koma aftur til arbeiðis
- Tað lækkar kostnaðin fyri sjúkrahúsinnleggingar og viðgerð uttanlands
- Tað styrkir føroyska heilsuverkið og byggir upp serkunnleika innanlands
- Tað ger, at vit fáa eina rættvísa og javna atgongd til viðgerð fyri øll

Eitt veruligt dømi: Ein 45 ára gamal maður fær heilabløðing. Hann verður fluttur til Danmarkar og fær góða viðgerð í tríggjar mánaðir. Tá hann kemur heim, er framgongdin góð, men hann hevur framvegis tørv á dagligari venjing og samskipaðari viðgerð fyri at koma aftur til arbeiðis. Tíverri finst ongin samlað skipan í Føroyum – og hann missir nógv av tí, hann hevur vunnið í Danmark. Hann endar á helvt, bæði likamliga og sálarliga, og kemur ikki aftur á arbeiðsmarknaðin. Hetta hevði verið heilt øðrvísi, um vit høvdu eitt føroyskt endurvenjingarsentur har endurvenjingar- og endurmenningartilgongdin var 100% væl løgd til rættis her heima frá A-Z.

Vit í Sambandsflokkinum meta hetta økið at hava alstóran týdning at verða skipað við lóg og ein endurvenjingarmiðstøð gjørd i Føroyum, sum kann tryggja neyðugu uppafturvenjingina. Tí verður hetta uppskot til samtyktar lagt fram.

Á Løgtingi, 28. august 2025

Bárður á Steig Nielsen | Helgi Abrahamsen | Magnus Rasmussen

Erhard Joensen | Johan Dahl | Eyðdis Hartmann Niclasen